# Heilsan til Barnahúsið Margit

EYÐGUNN SAMUELSEN
limur í sosialu nevnd Klaksvíkar býráð



Tað vóru framskygdar kvinnur og menn sum fyri 50 árum síðani tóku stig til Dr. Margrethu barnagarðin. Tey gjørdu tað, tí tey sóu ein tørv, samfelagið var byrjað at broytast, mammur fóru nú út at arbeiða. Henda gongdin hevur staðið við líka síðan, og tí hava vit í dag fleiri vælvirkandi stovnar og dagrøkt í Klaksvík.

Hesi fólkini, ið tóku stig til Dr. Margrethu barnagarðin, høvdu neyvan væntað, at tað fór at taka 50 ár til vit fingu fyrsta stovnin bygdan til endamálið.

Hví tók tað so longi. Helst eru fleiri orsøkir til tað, í politikki er tað altíð ein spurningur um raðfesting, hvat skattakrónurnar skulu nýtast til. Tað hevur tikið langa tíð at fáa sonevndu bleytu virðini við í raðfestingarnar, men tað er at fegnast um, at alt fleiri politikarar hava tikið hetta til sín. Og tað er at fegnast um at vit standa her í dag.

Vit vita, at Margit Joensen, sála var ein eldsál og brendi fyri hesum barnagarðinum. Hon hevur mangan staðið einsamøll, tí Oddbjørg Sólbjørg, ið var onnur kvinnan í býráðnum tá, var bert inni sum eykalimur. Arbeiðið hjá Margit og hinum í bygginevndini var so væl úr hondum greitt, at tekningarnar kundu nýtast nærum óbroyttar, tá byggjast skuldi.

Tað, at vit standa her í dag og fegnast er eitt tekin um, hvussu stóran týdning tað hevur at bæði kynini eru saman um at taka avgerðir.

Karmarnir á hesum stovninum eru av teim allarbestu, men karmar uttan innihald eru onki. Øll tit ið starvast her hava eina stóra ábyrgd, tit skulu nú ganga á odda fyri at skapa eitt innihald fyri tey børn ið verða latin í tykkara varðveitslu. Hetta setur stór krøv, sambært dagstovnalógini skulu tit:

**Menna og menta børnini**
Í samvinnu við foreldrunum geva børnunum eina kristna siðalagsliga uppaling

Búgva tey so tey kenna rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag

Menna skapandi evni, samleika, sjálvsvirði og sjálvkenslu

Tryggja eitt heilsugott og stimbrandi umhvørvi

Í samstarv við heimi styrkja barnsins fjølbroytnu menning – samspæl við náttúruna

Hetta eru stór og føgur orð, men eg ivist onga løtu í at tit, við Hedvig á odda, fara at megna at lyfta hesa uppgávu so barnahúsið Margit verður ein perla hjá Klaksvíkini.

Eg sigi við vilja ein perla, tí vit hava nakrar og kunnu ikki gevast fyrr enn vit hava eina røð av perlum, ið tilsamans geva eitt vakurt perluband innan barnaansing – tað má vera málið !

At enda vil eg ynskja tykkum øllum hjartaliga tillukku og góða eydnu.

# Atsókn móti rentabilitetinum í fiskiskipaflotanum

HERGEIR NIELSEN



Ein kunngerð er ávegis úr Fiskimálaráðnum, sum hevur við sær, at allur flotin verður lagdur eina viku undan jólum til eina viku eftir ársskiftið.

Hetta er í háárstíð fyri fiskaprísir. Prísirnir á marknaðinum eru í toppi, og bæði fiskimenn og skip fáa tá mestu úrtøkuna á árinum.

Ætlanin er at leggja allan flotan, eisini garnaskipini og djúpvatnstrolararnar, sum ikki eru undir fiskidagaskipanini.

Ætlanin hjá landsstýrismanninum og samgonguni er ivaleyst at verja toskastovnin, men herferðin rakar skeivt og fer at fáa stórar fíggjarligar avleiðingar, eitt nú fyri skip, sum bara fiska svartkalva og havtasku, sum tey fáa heilt góðan marknaðarprís fyri hesa ársins tíð á hvørjum ári.

Upsaprísirnir eru somuleiðis stak góðir fyrstu dagarnir eftir nýggjár, og eru tað fleiri skip, sum so at siga bjarga sær árinum hesa ársins tíð við einum skjótum túri millum jólanna.

Hetta verður nú søga.

Samgongan hevur av órannsakiligum orsøkum sett sær fyri at knúlva tað gevandi føroyska útflutningsvirðið um nýggjársleitið burtur úr hagtølunum, og at tvinga føroyskar fiskimenn til at ganga heima, tá úrtøkan úr sjónum er upp á tað mesta.

Politiska atsóknin móti rentabilitetinum í fiskiskipaflotanum liggur langt uttan fyri vanligt vit og skil.

Landsstýrismaðurin er á tingi spurdur, um hann kann geva løgtinginum og almenningum eina bara nøkunlunda skilagóða frágreiðing upp á henda skilaleysa fiskivinnupolitikkin, sum nú er í eygsjón.

Tað kundi hann ikki, og í samgonguni tóktist eingin áhugi vera fyri at støðga hesum skilaloysi.

# Føroyar sum eitt valdømi

FINNUR HELMSDAL
tingmaður



Útvarp Føroya hevði mikukvøldið sending um Føroyar sum eitt valdømi. Var spurdur um ymist í hesum sambandi av útvarpsmanni, hetta sum framsøgurmaður hjá Tjóðveldinum. Hoyrdi ikki sendingina, men skilji á lagnum, at fólk tulka tað eg segði, sum eri eg ímóti, at Føroyar gerast eitt valdømi. Tí fari eg at nýta hetta høvið til at siga, at eg taki fult undir við, at Føroyar gerast eitt og sama valdømi. Orsøkin til misskiljingina kann sjálvsagt vera tann, at eg havi ikki orðað meg nóg væl og greitt, tá eg tosaði við útvarpsmannin.

Ein onnur orsøk kann eisini vera, at eg svaraði ikki beinleiðis upp á spurningin, um Føroyar skulu gerast eitt valdømi, men meira uppá, hvat eg helt um neyðsemjuna hjá samgonguni og annars sjálvt uppskotið. Og eg kann eisini nýta høvið til at endurtaka, at eg haldi sokallaðu semjuna vera eitt neyðaregg uttan meining. Nýtti í sama viðfangi høvi til at finnast at, at samgongan (ella løgmaður) ger slíkt, uttan at hann roynir at fáa alt tingið við sær. Og eisini endurtaka, at eg haldi tað vera skeivt, at bæði tingið og Føroya fólk annars fáa so stutt skotbrá til at umhugsa og viðgera eitt so stórt álvarsmál. Og at enda kann eg siga upp aftur tað, sum eg segði um dygdina í sjálvum uppskotinum, at hon als ikki stendur mát.

Men kemur uppskotið frá Edmundi á aftur tingborð, og vit fáa høvi til at atkvøða um tað, so er eingin í ivi um, hvat undirritaði fer at gera. Eg fari at atkvøða ja fyri at Føroyar gerast eitt valdømi.

# Minningarorð um Martin Jakobsen

**f. 25.09.1951 Glyvrar**



Hóast Martin hevur verið nógv royndur við sjúku og mótgongd, so kom tað dátt við at Martin nú var tikin frá okkum.

Martin hevur síðani hann var 5 ára gamal verið sjúkur av sukursjúku, og hesi seinastu uml. 13 árini hevur sjúkan verið ógvuliga hørð móti honum. Hóast ymisk likamlig brek, hevði hann ein serstaka sterkan vilja sum fáur.

Umframt at vera virkisleiðari, pápabeiggi og forrætningsfelagi, so var Martin ein av mínum góðu vinum sum stuðlaði mær tá tað stóð á. Hann hevur altíð verið sera góður í ráðum og vísur á nógvum lívsins viðurskiftum.

Martin hevði eini serstøk evni at tilrættaleggja framleiðslu, og verður tað tí ein stórur saknur hjá okkum á virkinum, nú hann er farin. Martin dámdi eisini væl at fáast við framleiðslu, og tey áhaldandi mál hann setti sær, legði hann nógv fyri at náða. Hann var tí serstakliga góður virkisleiðari, og so mikið størri verður saknurin.

Martin var sonur Júttu og Jóan Hendrik Jacobsen, á Bakka her á Glyvrum. Hann var føddur 25.09.1951 og giftur við Katrin D. Jacobsen í Tórshavn. Saman høvdu tey 4 børn, Høgni, Tóra, Edith og Jóan Pauli.

Martin var útbúgvin matvøru verkfrøðingur, og hevði hansara stóra vitan innan hetta øki stóran týdning fyri menningina av framleiðsluni sum hann stóð fyri ein stóran part av hansara lívi. Hann var við til at menna fleiri virkir í Noregi, Tórshavn og á Glyvrum.

Vit fara at sakna Martin ómetaliga nógv, tað sýnist ógjørligt at útfylla tað pláss, sum hann hevur havt bæði í mínum lívi og í okkara viðurskiftum annars. Tað verður tungt at lyfta tær uppgávur, sum hava ligið á hansara herðum líka til tað síðsta.

Martin hevði eitt serligt lyndi, sum helst var ein av orsøkunum til at hann kundi bera tað tungu lagnu sum sjúkan gav honum. Hann gramdi seg ongantíð viðvíkjandi sínum likamligu støðu, altíð positivur og sá møguleikar ístaðin fyri trupulleikar.

Katrin, Jóan Pauli, Edith, Tóra og Høgni, Jesus styrki tykkum í sorgini og sakninum eftir tykkara kæra manni og pápa.

Æra verið minnið um Martin.

**Regin Jacobsen**